almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



KREA.FO

## Almannastovan søkir eftir
# STARVSFÓLKALEIÐARA

*Umsóknarfreist: 20. september 2007 kl. 12.*

Almannastovan er stovnur í støðugari menning og sum alla tíðina skal laga seg til krøv frá tí politiska myndugleikanum og samfelagnum annars. Endamálið er, at viðskiftafólk okkara til eina og hvørja tíð skulu kenna seg væl og fáa eina professionella tænastu. Skulu vit røkka tí málinum, er neyðugt at vit hava starvsfólk, sum eru útbúgvinarliga væl fyri og eisini trívast í gerandisdegnum. Okkum tørvar eitt fólk, sum burturav kann taka sær av hesi uppgávu.

Almannastovan er sett saman av fýra økisdeildum, trimum serdeildum, eini veitingardeild og fimm stápsdeildum. Harumframt eru seks stovnar fyri børn og ung undir Almannastovuni eins og skrivstovan hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini. Tilsamans fevnir hetta um eini 300 – 400 starvsfólk.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólkaleiðaranum eru m.a.**

- at standa á odda fyri starvsfólkadeildini
- at standa fyri og leggja til rættis starvsfólkapolitikkin
- at standa fyri og leggja til rættis útbúgvingar fyri starvsfólkini
- at vera stuðul og ráðgevi hjá deildarleiðarunum
- at vera við til at seta fólk í starv
- at undirvísa innanhýsis í ávísan mun
- at hava ábyrgd av lýsingum eftir starvsfólki og umsitingina av hesum
- at skipa fyri innanhýsis evnisdøgum
- annað fyrifallandi á økinum

**Førleikakrøv**

Hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni ella annað viðkomandi. Vit rokna við einum persóni, sum tekur ábyrgd og sum dámar avbjóðingar og er fyrikomandi. Vit vænta harumframt, at tú

- ert ein góður leiðari, sum kann ganga á odda og menna stovnin
- hevur eyka orku og dugir at stuðla og lurta
- hevur góðar menniskjansligar eginleikar
- hevur hollar arbeiðsroyndir

**Løn og setanartreytir**

Lønin verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvið hevur tilvísing til stjóran. Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 35 35 10, ella 21 54 80.

**Umsókn**

Umsókn við avriti av prógvum og viðmælum skal sendast til: Almannastovuna, Smyrilsveg 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn. Vinarliga merkið brævbjálvan "Starvsfólkaleiðari".

***Um stovnin***

*Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av veitingum fyriskip- aðar eftir pensjóns-, dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m. Stovnurin umsitur veitingar fyri umleið 900 mió. kr. árliga umframt at reka stovnarnar fyri børn og ung.*

# Flemming Østergaard og Jens Kramer Mikkelsen fyrilestrar á Hotel Føroyum




**FC Amager og Team Føroyar Business Club skipa hósdagin 13. september fyri serligum tiltaki á Hotel Føroyum.**
Tiltakið byrjar kl 17.00

Flemming Østergaard: "FCK A/S, rentabel professionel fodbold i verdensklasse"
Jens Kramer Mikkelsen: "Ørestaden, en ny bydel i København. Fra mark til en af Europas moderneste bydele"

Náttúrði er við í prísinum.
**Kostnaður fyri hvønn: 950 kr.**

Pláss er einans fyri 450 gestum til hetta serstaka tiltakið.

FCA

**Bílegg agongumerki á www.eik.fo. Forsølan byrjar mikudagin 29. aug. kl 10.00.**